# Veðrið



**Fimm-daga-for-søgnin frá DMI**

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur, greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Strúkur í vindi ella skrið av útnyrðingi við kava- ella heglingsæli. Hitin á ella beint undir frostmarkinum. Út á dagin lækkar hann niður í vestan og minkar niður í stívt andøvsgul og tað verður klárari í veðrinum. Um náttina lækkar hann í sunnan ella landsynning. Tað verður skýggjað og hitin eitt vet omanfyri frostmarkið.




**Fríggjadagin:**
Hann veksur vindin upp í skrið ella storm, at byrja við av landsynningi, sum støkkur vesturum til útsynning. Okkurt skifti hvassur stormur. Skýggjað og vátaslettingur, seinni regn. Hitin millum 1 og 5 stig.




**Leygardagin:**
Hvassur vindur til skrið av útsynningi við ælaveðri, partvís sum heglingsælingi. Hitin millum 2 og 6 stig.

**Sunnudagin og mánadagin:**
Hann minkar vindin niður í gul til stívt andøvsgul av útsynningi. Hann klárar í og møguliga onkrir sólglottar. Hitin millum 2 og 7 stig.



# Kannar tørvin á eldraíbúðum

*Húsalánsgrunnurin kannar, hvønn bústaðartørv fólk, ið eru 55 ár og eldri hava*

Húsalánsgrunnurin sendi fyrst í desember mánaði í fjør út spurnabløð um alt landið til fólk 55 ár og eldri, fyri at kanna tørvin á einum framtíðar ynskiligum bústaðarmynstri, undir heitinum eldrabústaðir.

Húsalánsgrunnurin sigur, at spurnabløðini eru send út uttan at nakað navn ella P-tal er skrásett, og tí kunnu fólk eykkaleys svara spurningunum.

Spurnablaðið er sett upp í tveimum pørtum:

1. Um bústaðarviðurskiftini, sum tey eru.
2. Um ætlanir eru um annan bústað.

Húsalánsgrunnurin fekk hópin av aftursvarum beinanvegin, men gjørdist tað tó skjótt grunninum greitt, at nógv fólk løgdu spurnablaðið frá sær til eftir jólastákið og halguna annars.

Grunnurin valdi tí at útseta innlatingartíðina til eftir ársskiftið.

Nú verður so aftur farið undir at raðfesta tey svar, sum higartil eru komin.

Grunnruin leggur tó afturat, at møguleiki enn er at svara hesa vikuna afturat, og verður innlatingarfreistin sostatt sett til 10. januar.




Eitt lágtrýst, undir 970 hPa, sunnan fyri Ísland, fer í ein landnyrðing.




Eitt lágtrýst, 985 hPa, fer úr Newfoundlandi móti Davisstrætinum. Brúgvaløg haðani fara fram við Føroyum fríggjadagin. Lágtrýstið hevur vestanvind við sær.




**Hitalagið mált frá 04./01. kl 06[00]–05./01. kl 06[00]. Hitin í gjár: 3,5°C**
Minsti hiti máldur í jan.: **÷8,8°** Mesti hiti máldur í jan.: **11,6°**




Avfallið: 8,0 mm – **mált frá 04./01. kl 6[00]–05./01. kl 06[00]**
Avfallið higartil í januar: 37,4 mm

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷15 |
| Nuuk | ÷9 |
| Qaqortoq | ÷15 |
| Ammassalik | ÷7 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | ÷3 |
| Seyðisfjørður | 0 |
| Tórshavn | 5 |
| Lerwick | 4 |
| Aberdeen | 6 |
| London | 6 |
| Tromsø | ÷1 |
| Bergen | 4 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 4 |
| Keypmannahavn | 5 |
| Helsinki | 0 |
| Moskva | 1 |
| Berlin | 5 |
| Warzawa | 3 |
| Kiev | 1 |
| Bukarest | ÷9 |
| Paris | 8 |
| Madrid | 6 |
| Róm | 11 |
| Malorca | 12 |
| Athen | 8 |
| Malta | – |
| Tunis | 14 |
| Beijing | ÷1 |
| New Dehli | 9 |
| Bangkok | 35 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | – |
| New York | 14 |
| Miami | 25 |
| Los Angeles | 17 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | – |
| La Paz | 15 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 32 |

## Vestfalskyrrindi

3. januar: Jørðin næst sólini
4. januar: Mánin longst frá jørðini
6. januar: Tendring

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp | sp | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp | sp | Hestfirði/Sundalagnum fp | sp | Vestmannasundi fp | sp | Mykinesfirði fp | sp | Nólsoyarfirði fp | sp | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp | sp | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp | sp | Kalsoyarfirði/Svínoyarfirði fp | sp | Hvannasundi fp | sp | Fugloyarfirði fp | sp |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 6. jan. | 0600 | 1819 | 0500 | 1719 | 0515 | 1734 | 0800 | 2019 | 0900 | 2119 | 0415 | 1634 | 0315 | 1534 | 0615 | 1834 | 0715 | 1934 | 0545 | 1804 | 0700 | 1919 |
| 7. jan. | 0639 | 1858 | 0539 | 1758 | 0554 | 1813 | 0839 | 2058 | 0939 | 2158 | 0454 | 1713 | 0354 | 1613 | 0654 | 1913 | 0754 | 2013 | 0624 | 1843 | 0739 | 1958 |
| 8. jan. | 0716 | 1935 | 0616 | 1835 | 0631 | 1850 | 0916 | 2135 | 1016 | 2235 | 0531 | 1750 | 0431 | 1650 | 0731 | 1950 | 0831 | 2050 | 0701 | 1920 | 0816 | 2035 |
| 9. jan. | 0752 | 2009 | 0652 | 1909 | 0707 | 1924 | 0952 | 2209 | 1052 | 2309 | 0607 | 1824 | 0507 | 1724 | 0807 | 2024 | 0907 | 2124 | 0737 | 1954 | 0852 | 2109 |


Original bosal Útstoyt



ES
p/f Esmar Simonsen
Kambsdalur
FR-530 Fuglafjør›ur
Tlf. 444405
Fax444629




BILLUTIR



ÚTVEGAST TIL FLEST ALLAR BILAR
F.A. BILLUTIR
tlf. 421605 fax 421666

TURRIKLÆÐI, HÚGVUR, T-SHIRT, KEPPAR og FLØGG



12. MAÐUR
Tlf. 213212

fk